FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# Býráðið

**Dagfesting:** 29.11.2023 kl. 00:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 42/23 | 23/00524-1 | Eykajáttan |
| 43/23 | 23/00538-1 | Málslýsing FÆ2024 |
| 44/23 | 23/00561-1 | Býráðsfundir í 2024 |
| **Til kunning** | | |
| | | |

1

**Til støðutakan**

**42/23**
**23/00524-1 Eykajáttan**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 02.11.2023 | 42/23 |
| 2 Býráðið | 13.11.2023 | 40/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.11.2023 | 48/23 |
| 4 Býráðið | 29.11.2023 | 42/23 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd og býráð |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Leiðslubólkurin í Fuglafjarðar kommunu hevur gjøgnumgingið og viðgjørt tey einstaku rakstrarstøðini og er komin framm til, at íalt er neyðugt við umraðfestingum á DKK 4.680.000. Talan er í summum førum um staðfesta meirnýtlsu, og í øðrum førum er talan um væntaða meirnýtslu. Hetta er galdandi fyri øll økir í kommununi, undantikið økið 1. Fígging er somuleiðis funnin á øllum økjum, undantikið á økið 1. Sostatt er umraðfestingin útreiðsluneutral. Orsøkirnar til meirnýtsluna eru ymiskar fyri tey einstaku rakstrarstøðini og eru lýstar í hjálagda skjalið. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| RS | | Væntað meirnýtsla |
|---|---|---|
| 230 | Kommunal tannrøkt | 400.000 |
| 231 | Íløgur tannrøkt | 180.000 |
| 250 | Barnavernd | 600.000 |
| 264 | Doktarahúsini | 100.000 |
| 320 | Kambur húsaútreiðslur | 170.000 |
| 410 | Fólkaskúlin | 300.000 |
| 536 | Mentanarvikan | 120.000 |
| 570 | Fótbóltsvøllurin | 100.000 |
| 571 | Fótbóltsvøllurin íløgur | 100.000 |
| 650 | Vatnveiting | 1.000.000 |
| 670 | Vegir | 700.000 |
| 672 | Reinhald, kavarudding | 50.000 |
| 690 | Bilar, maskinur | 250.000 |
| 740 | Moldgoymsla | 150.000 |
| 751 | Fuglafjarðar havn íløgur | 460.000 |
| Meirnýtsla í alt | | 4.680.000 |

Til tess at fíggja staðfestu og væntaðu meirnýtsluna, hevur okkara gjøgnumgongd víst, at tað er gjørligt at flyta játtan frá hesum rakstrarstøðum: 3

| RS | | Fígging av meirnýtslu |
|---|---|---|
| 220 | Kommunulæknin | -100.000 |
| 250 | Barnavernd | -350.000 |
| 290 | Ymiskur stuðul | -130.000 |
| 414 | Undirvísingartilfar | -200.000 |
| 430 | 64 Skúlin | -1.000.000 |
| 532 | Kunning um kommununa | -200.000 |
| 534 | Ymisk mentanartiltøk | -100.000 |
| 542 | Fuglafjarðar bókasavn | -100.000 |
| 564 | Piddasahandil | -100.000 |
| 632 | Kommunal útstykking | -500.000 |
| 651 | Vatnveiting íløgur | -450.000 |
| 671 | Vegir íløgur | -100.000 |
| 673 | Gongubreyt Kambsdal | -200.000 |
| 750 | Fuglafjarðar havn | -1.000.000 |
| 792 | Kunningarstovan | -150.000 |
| Íalt | | -4.680.000 |

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Broyting millum 1. og 2. viðgerð<br>Uppskot er at nýta 200 tkr. til viðlíkahald av el-netinum, samstundis sum FT-NET grevur fyri fiburkaðalum og at nýta 320 tkr. til nýggjan bil til teknisku deild. Talan er um útreiðsluneutrala broyting har peningurin verður fingin til vega frá rakstrarstøðunum 112: Val og valnevndir, 632: Kommunal útstykking, 671: Vegir íløgur og 673: Gongubreyt Kambsdal.<br><br>Talan er tí um eina samlaða útreiðsluneutrala eykajáttan uppá 5.200 tkr.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Sambært kommunu stýrislógini §38 skal fíggjarnevndin ummæla uppskot til eykajáttan, sum skal leggjast fyri býráðið og sambært § 41 krevur eykajáttanin tvær góðkenningar frá kommunustýrinum við í minsta lagi 14 daga millumbilum.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>Kommunustýrislógin og Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>Útgreining av meirnýtslu til eykajáttan heyst 2023<br>Uppskot til flytingar. Xlsx</td></tr>
<tr><td colspan="4" align="center">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Nei</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Nei</td><td>Nei</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Tilmæli til fund í fíggjarnevndini 2. november 2023<br>Eykajáttanarumbønin omanfyri er tilsamans DKKM 4.680 og er peningur funnin innanfyri verandi karmar. Mælt verður til, at fíggjarnevndin viðger umbønina og síðani mælir býráðnum til at gera omanfyri nevndu umraðfestingar, alternativt, at gera umraðfestingar í mun til verandi fíggjarætlan.<br><br>Tilmæli til fund í fíggjarnevndini 27. november 2023<br>Eykajáttanarumbønin til 2. viðgerð er tilsamans 5.200 tkr. og er peningur funnin innan verandi karmar. Mælt verður til, at fíggjarnevndin viðgerð uppskotið og ger tilmæli til býráðið um at góðkenna eykajáttanaruppskotið.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">02. november 2023</td></tr>
</table>

**Fíggjarnevndin 02. november 2023:**
Fíggjarnevndin tekur undir við útreiðsluneutralu eykajáttanini uppá 4.680 tkr. og mælir býráðnum til at samtykkja hesa eykajáttan.

**Býráðið 13. november 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við eykajáttanaruppskotinum og beinir tað víðari til 2. viðgerð.

**Fíggjarnevndin 27. november 2023:**
Fíggjarnevndin tekur undir við broytingunum ímillum 1. og 2. viðgerð og mælir býráðnum til at samtykkja eykajáttanina við 2. viðgerð.

**Býráðið 29. november 2023:**
Býráðið tekur einmælt undir við eykajáttanini við 2. viðgerð.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**43/23**
**23/00538-1 Málslýsing FÆ2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.11.2023 | 47/23 |
| 2 Býráðið | 13.11.2023 | 41/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.11.2023 | 49/23 |
| 4 Býráðið | 29.11.2023 | 43/23 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Karmarnir til fíggjarætlanina hjá Fuglafjarðar kommunu fyri fíggjarárið 2024 blivu viðgjørdir og samtyktir í fíggjarnevnd býráðsins 25.september 2023 og í býráðnum 28.september. Umsitingin hevur síðani arbeitt við málinum.<br>Eitt samlað býráð hevur arbeitt víðari á arbeiðsfundum í døgunum 30-31 oktober 2023, eins og nevndarviðgerðir hava verið í tíðarskeiðnum 1.november til 13.november 2023.<br><br>Samanumtikið er høvuðsinnihaldið í fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2024 soljóðandi:<br>Fíggjarætlanin javnvigar við kr. 146.908.808,- og er fíggjað við kr. 113.353.811 í skatta- og avgjaldsinntøkum, Rakstrarinntøkum á kr. 33.554.997 og við kr.11.474.449 í innistandandi peningi.<br><br>Inntøkurnar av A og B skatti eru mettar til kr. 77.314.811,- ið er kr.5.683.449 lægri enn nettorakstrarútreiðslan á kr. 82.998.260 Miðal vøksturin í rakstrinum er 5% í mun til fíggjarætlanina í fjør. Partafelagsskatturin er mettur til kr. 15.000.000,- ið er kr. 1.500.000 hægri enn metingin fyri fíggjarárið 2023.<br><br>Bæði samtykt og ávegis uppskot frá Føroya Løgtingi, økja um óvissuna av metingina av partafelagsskattinum komandi ár. Flytingar frá landinum í mun til kapitaleftirlønir, DIS og FAS verða mettar til kr. 20.989.000, í mun til DKM 18,7 í 2023. Íroknað hækkingina er nýggj flyting frá landinum – mett tøku- og veiðugjøld á kr. 920.000.<br><br>Rakstrarkostnaðurin av eldrasamstarvinum Nánd verður mettur til kr. 25.182.461, ið er áleið kr. 850.000 hægri enn mett í fjør.<br><br>Nettoíløgurnar verða mettar til kr. 31.030.000 |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Íløgurnar eru á øllum økjum. Dentur er lagdur á skúlabygging, umhvørvisøkið, eins og neyðugar íløgur á tekniska økinum eru raðfestar. Somuleiðis eru neyðugar íløgur raðfestar á vinnuøkinum.<br><br>Neyðugt verður møguliga, at lánifíggja partar av íløgunum, hóast hækkandi rentustøði viðførir hækkandi rentuútreiðslur og lækkandi lánsavdráttir.<br>Rentuútreiðslurnar økjast DKM 1,5 meðan avdráttirnir lækka við kr. 700.000<br>Skattaprosentið er 21,25 og barnafrádrátturin er hækkaður 500 kr. fyri hvørt barn til 8.000 kr. fyri hvørt barni.<br><br>**Broytingar til 2. viðgerð**<br>Á arbeiðsfundi í býráðnum 20 november 2023, varð tillaging gjørd í játtanini til løgur, tó innanfyri løgukarmin samtyktan við 1. viðgerð. Á fundinum varð skotið upp at raðfesta 700 tkr. til nýggja brúgv tvørtur um Skarðsá. Peningur til hetta varð tikin av øki. 2 har løgujáttnin til Vesturstovu varð lækkað frá 2.300 tkr. til 2.200 tkr., øki 3 har løgujáttninar til áviksavist Stropan og Barnalund lækkaðu frá 150 tkr. til 100 tkr., eins og løgujáttanin til Kamb varð lækkað frá 1.000 tkr. til 800 tkr. Restin av fíggingini kemur frá øki 6. har játtanin til gongugøtu millum Kambsdal og Fuglafjørð lækkar frá 500 tkr. til 300 tkr. og 100 tkr. eru raðfestar til endamálið innanfyri løgujáttanina nýgerð vegir.<br><br>Út yvir omanfyristandandi broytingar í løgujáttnaini fer FÆ2024 óbroytt víðari til 2. viðgerð. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | §39 í kommunustýrislógini er soljóðandi:<br><br>***§ 39.** Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.*<br>*Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.*<br>Í somu lóggávu er staðfest í §53 stk.2,nr.2 at:<br>***§ 53, stk. 2, nr. 2** Til tess at landsstýrismaðurin kann røkja sínar eftirlitsskyldur við fíggjarligu viðurskiftinum hjá kommununum, skulu tær lata honum:*<br><br>*2) samtykta fíggjarætlan innan 3 gerandisdagar eftir 1. desember* |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>§§ 39 og 53, stk. 2, nr. 2 í kommunustýrislógini<br>• **Møgulig fylgiskjøl** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | til 2.viðgerð Kopi af 1Fíggjarætlan RS 1234567 2024<br>Viðmerkingar til FÆ2024 samlað til 2. viðgerð<br>Yvirlit broytingar millum 1 og 2 viðger | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | **Tilmæli til fundin í Fíggjarnevndini 13. november 2023**<br>Mælt verður til at Fíggjarnevndin viðgerð uppskotið til Fíggjarætlanina, og ger tilmæli til býráðið um at samtykkja uppskotið við 1. viðgerð 13. november 2023.<br><br>**Tilmæli til fundin í Fíggjarnevndini 27. november 2023**<br>Mælt verður til at Fíggjarnevndin viðgerð uppskotið til Fíggjarætlanina við teimum broytingum skotið er upp í løgujáttanini og ger tilmælið til býráðið um at samtykkja uppskotið við 2. viðgerð 29. November 2023. | | |
| Dagf | 12. november 2023 | | |



**<u>Fíggjarnevndin 13. november 2023:</u>**
Fíggjarnevndin tekur undir við uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2024 og mælir býráðnum, at samtykkja hesa við 1. viðgerð 13. november 2023.

**<u>Býráðið 13. november 2023:</u>**
Býráðið tók einmælt undir við fíggjarætlanini til 1. viðgerð og beinir málið víðari til 2. viðgerð.

**<u>Fíggjarnevndin 27. november 2023:</u>**
Fíggjarnevndin býtir seg upp í ein meirluta og ein minniluta, í mun til broytingarnar ímillum 1. og 2. viðgerð.

Minnilutin Ólavur Larsen mælir til, at útseta íløguna til Brúnna um Skarðsá og ístaðin at seta 500 tkr. av til at gera verkætlanir á tekniska økinum lidnar. Hann mælir til at tær 50 tkr. sum verða tiknar av íløgukontuni hjá ávikavist Stropanum og Barnalund, 200 tkr. sum verða tiknar av Kambi og tær 200 tkr. frá gongugøtuni til Kambsdal verða nýttar á kontuni nýgerð vegir, at gera verkætlanir lidnar sum tekniski leiðarin hevur víst á. Játtanin til løgur á Vesturstovu verða óbroyttar frá 1. viðgerð.

Meirlutin Eyðun á Lakjuni og Dávur Juul taka undir við teimum broytingum mælt er til ímillum 1. og 2. viðgerð og mælir býráðnum at samtykkja FÆ 2024.

**Býráðið 29. november 2023:**
Býráðið stemmaði fyrst um minnilutauppskotið hjá Ólavi Larsen fíggjarnevndarlimi. Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu fyri meðan Eivin Breiðsaskarð, David Andreasen, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu ímóti. Hetta uppskotið fall sostatt.

Býráðið stemmaði so um broytingaruppskotið frá meirilutanum í Fíggjarnevndini Eyðun á Lakjuni og Dávur Juul. Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu ímóti meðan Eivin Breiðsaskarð, David Andreasen, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu fyri. Sostatt varð hetta uppskotið samtykt.

Síðani varð atkvøtt um samlaðu fíggjarætlanina saman við broytingaruppskotinum hjá meirilutanum í fíggjarnevndini. Býráðið samtykti einmælt fíggjarætlanina við 2. Viðgerð.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**44/23**
**23/00561-1 Býráðsfundir í 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.11.2023 | 44/23 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Skotið verður upp at býráðsfundirnir í 2024 verða hildnir í býráðssalinum í Støð 5 í Fuglafirði hesar dagar.<br>• Hósdagin 25. januar 2024<br>• Hósdagin 29. februar 2024<br>• Mikudagin 27. mars 2024 (Hettar fyri at fólk kunna fara av landinum í páskaferiu hósdagin 28. mars)<br>• Mikudagin 24. apríl 2024 (Hósdagur 25 apríl er flaggdagur)<br>• Hósdagin 30. mai 2024<br>• Hósdagin 20. juni 2024<br>• Hósdagin 29. august 2024<br>• Hósdagin 26. september 2024<br>• Hósdagin 31. oktober 2024<br>• Hósdagin 28. november 2024<br>• Hósdagin 19. desembur 2024<br>Fundirnir byrja kl. 19.00. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært §4 í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, skal býráðið taka avgerð um nær og hvar vanligir býráðsfundir skulu vera og skal hetta kunngerast við byrjanina av hvørjum álmanakkári. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Kommunustýrisskipan fyri Fuglafjarðar kommunu.<br>• **Møgulig fylgiskjøl** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |

10

Fundurin lokin kl. 20.30

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir býráðnum at takk undir við uppskotinum til dagfesting av býráðsfundunum fyri 2024. | | |
| Dagf | 24.11.2024 | | |

**Býráðið 29. november 2023:**
Býráðið samtykti einmælt broytingaruppskot um ikki at læsa allar fundirnar til at vera í býráðssalinum í støð 5 fyri at hava møguleika at hava einstakar fundir á Kambsdali ella á Hellunum.

Býráðið samtykti einmælt uppskotið frá borgarstjóranum um fundardagar fyri býráðsfundir í 2024.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo